# ARBEIÐSBLAÐ 1

## INNLEIÐSLA TIL RÆÐUFILMSSJANGRUNA

Hava tit sæð ein ræðufilm?

Hava tit upplivað, hvussu hetta slagið av filmum kunnu fáa hjartað til at duka skjótari, fáa tykkum til at sveitta ella leypa upp í stólinum?

Í hesi filmsverkætlanini, sum vit kalla 'Krossklipp' framleiða skúlaflokkar um øll Norðurlond ræðufilmasenur, sum ein professionellur filmsleikstjóri so savnar, fyllir upp við nýggjum upptøkum, og setir saman.

Tit skulu finna tykkara egnu ræðu-leiklutir, orðaskifti og 'jump scare'-senur. Við tykkara luttøku hava tit møguleika fyri at vinna eina filmsveitslu fyri allan flokkin til eitt virði á **5.000 DKK**. Vit løna tí flokkinum, ið vísir serligt ídni og uppfinnsemi.

Filmurin verður frumsýndur á www.nordeniskolen.org

Tit byrja tilgongdina við at hyggja at ræðustuttfilminum 'I dare you' frá 2019. Tað er danin Casper Balslev, ið hevur leikstjórnað.

Leggið til merkis høvuðsleiklutin, skrímsl, 'location' og brúk av ljósi, ljóði, spenningi (suspence) og 'surprise' meðan tit hyggja at filminum.

### AFTANÁ SKULU TIT SETA ORÐ Á LIÐIRNAR Í FILMINUM

- Lýsið høvuðspersón
- Lýsið skrímsl og staðið, har filmað varð

Kjakist um virknaðin av **'suspense'** og **'surprise'** í filminum. Og brúk av **ljósi**, **ljóði** og **upptøkuvinklum**.

Góða eydnu.

**SJÁLVBOÐIN UPPGÁVA:**
Greinið myndavinklarnar í 'I dare you' – hvussu brúkar leikstjórin myndatólið og hvussu fær tað spenningin til at økjast?

***PREI OG HUGSKOT***

# SUSPENSE OG SURPRISE

’Suspense’ og ’surprise’ eru tveir mátar at brúka sum frásøgukynstur.

Við at brúka ’suspense’ verður spenningurin toygdur út í langa tíð, og kann næstan gerast ótoliligur. Við at brúka ’surprise’ verða vit (hyggjararnir) kløkkaðir og fær okkum til at leypa upp í stólinum.

Bæði ’suspense’ og ’surprise’ kunnu brúkast til at skapa skakandi støður. ’Suspense’ er spenningur, sum spakuliga økist. ’Suspense’ uppstendur, tá vit sum hyggjarar vita meira enn persónarnir í filminum um t.d. eina tikkandi bumbu ella ein drápsmann í kjallaranum.

Krossklipping verður ofta brúkt til tess at skapa ’suspense’. Tað verður klipt t.d. millum høvuðspersónin, ið ikki órar ilt, og drápsmannin, ið nærkast. Tað gevur ein skakandi virkna, og vit fáa hug til at varskógva høvuðspersónin.

Tíðarleinging kann eisini skapa eyka ’suspense’.

Ljóðsíðan hevur eisini stóran týdning fyri at byggja upp ’suspense’

